Salmonella funnin í turkiskum sesampasta

Heilsufrøðiliga Starvsstovan ávarar um salmonellafongda turkiska pastu

MATEITRAN
Eirikur Lindenskov

Í Avstralia hava tey funnið Salmonella DT 104 bakteriuna í fleiri turkiskum Helva-vørum frá framleiðaranum Gulsan og Ceren. Í Gulsan-vørunum er staðfest, at talan er um Salmonella-bakteriuna, sum heilivágur ikki rínir við. Cerenvørurnar verða framvegis kannaðar.

Talan er um søta turkiska sesampastu við navninum »Gulsan Kakaolou Helva« (við sjolulátasmakki) og »Ceren Vanilyali Helva« (við vaniljusmakki) eins og »Ceren Kakaolou Helva« (við sjokulátasmakki).

Fyribils er frætt um 14 sjúkratilburðir úr Australia, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan í tíðindaskrivi.

Pakkarnir, sum Salmonella DT-104 er funnin í, eru hesir:

- Gulsan Kakalou. – 800 g. Minst holdbar til 10/2001. Produceret 10/2000. Prod. nr. 18151
- Gulsan kakaolou. – 400 g. Minst holdbar 10/2001. Produceret 10/2000. Prod. nr.: 18151
- Gulsan Sade. – 400 g. Mindst holdbar 10/2001. Produceret: 10/2000. Prod. nr.: 18154
- Gulsan Antep Fistikli. – 800g. Minst holdbar 10/2001. Produceret 10/2000. Prod. nr.: 17164
- Veren Vanilyali – 350 g. Mindst holdbar 10/2001. Produceret 10/2000. Prod nr.: 18283 samt 17353
- Ceren Kakaolou – 350 g. Mindst holdbar 10/2003. Produceret 10/2000. Prod. nr.: 17348.

Tá tað ikki kann útilokast, at hesar vørur eru til sølu í Danmark, heitir danska matvørustýrið á brúkarar, sum liggja inni við hesum vørum, at beina fyri teimum ella bera tær aftur, har tær eru keyptar.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur somu áheitan á føroyskar brúkarar.

Danska matvørustýrið ger eisini vart við, at ábyrgdin fyri ikki at selja heilsuskaðiligar vørur liggur hjá innflytara og handlandi.

So varð Ormurin langi tikin

Nú er Týr ikki longur nummar 1 á hitlistanum hjá Útvarpi Føroya, 15 tær bestu.

Leygarkvøldið datt Ormurin langi av fremsta plássinum, tí gospelrockbólkurin I AM trokaði seg framum.

Týr er tann føroyski bólkurin, sum hevur verið longst nummar 1 á 15 teimum bestu, og tað er bara amerikanski bólkurin, Bon Jovi, sum hevur verið fleiri vikur á fremsta plássinum.

Ormurin langi kom beinleiðis inn sum nummar 1 á 15 teimum bestu fyri 10 vikum síðani, og sangurin hevur ligið á ovastu rók síðani. Men leygarkvøldið fór vakra balladan hjá I AM, Friðsæla stund, av 2. plássi og upp á 1. pláss.

Sangurin hjá I AM er at finna á Prix Føroyar útgávuni hjá Útvarpinum. Hetta var ein av sangunum, sum I AM framførdi í finaluni í hesi kapping.

All that Rain er nummar 5 á 15 teimum bestu í løtuni við teirra Happy when you're gone/Tribal Jam, meðan Clickhaze reyk út av listanum leygarkvøldið.

Pop.fo

Rannvá Troest leiðari

Ferðavinnan í Eysturoy hevur sett nýggjan leiðara á Kunningarstovuni í Saltangará.

Nýggi leiðarin er 30 ára gamla Rannvá Troest. Hon byrjaði í nýggja starvinum mikudagin 8. august.

Í hesum sambandi verður almenn móttøka seinni í mánaðinum.

Børnini í Havn fáa ikki neyðugu fyribyrgjandi røktina

Jenis av Rana vil hava Sámal Petur í Grund at greiða frá, hví hann ikki lýsir eftir skúlabarnalækna til Suðurstreym, so sum Helena Dam á Neystabø hevur lovað

Hóast landsstýriskvinnan lovaði at søkja eftir lækna, so skúlalækni varð settur til skúlaársbyrjan, hevur enn eingin lýsing verið at sæð. Hetta vil Jenis av Rana hava greiðu á

POLITIKKUR
Eirikur Lindenskov

Jenis av Rana fer at seta Sámal Peturi í Grund, landsstýrismanni í heilsu- og almannamálum fyrispurning um, hvør orsøkin er, at tað ikki enn er søkt eftir skúlalækna til suðurstreymoyarøkið. Hann vísir á, at landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum í vár lovaði Føroya Løgtingi, at hetta fór at verða gjørt, so lækni var tøkur til byrjanina av nýggja skúlaárinum.

Jenis av Rana v il eisini hava landsstýrismannin at greiða løgtinginum frá, hvussu støðan er viðvíkjandi skúlalæknum í øðrum økjum í landinum.

– Tíðliga í vár svaraði Helena Dam á Neystabø, sum tá umsat hetta málsøkið, fyrispurningi frá mær, at hon við fullari vissu kundi lova, at lýst fór at verða eftir skúlalækna til byrjanina av nýggja skúlaárinum, sigur Jenis av Rana.

– Lyfti hennara tykist tíverri brotið, og enn eitt ár byrjar við ongum skúlalækna í høvuðsstaðarøkinum, økinum, sum rúmar 2/5 av børnum landsins, og er hetta enn ein kapittul í einari longri søgu um áralanga vanrøkt av komandi ættarliðinum, sigur tingmaðurin.

Jenis av Rana vísir síðani á, at fram til 1994 hevði eingin skúlalækni verið í Suðurstreymi í mong ár. Hóast áhaldan di áheitanir vildu skiftandi landsstýri ikki lýsa eftir slíkum, brúktu m.a sum undanførslu, at eingin fór at søkja.

– Tá tað at enda eydnaðist mær at fáa býráðið at heita á landsstýrið at søkja, komu tvær umóknir, lækni varð settur og røkti starvið í trý ár.

Á vári 97 segði hesin seg úr starvi, og hóast margfaldar áheitanir hevur ikki eydnast at fáa skiftandi landsstýrismenn at røkja uppgávu sína og skipa so fyri, at børn í høvuðsstaðarøkinum fáa ta fyribyrgjandi røktina, sum samfeløg á okkara støði meta avgerandi neyðuga, sigur Jenis av Rana.

Tingmaðurin heldur, at hægsti politiski myndugleikin má vera sína uppgávu vaksin og kenna ábyrgd. Skúlalæknaarbeiðið kann ikki yvirmetast, tað er fremsta fyribyrgingartiltak fyri heilsu skúlabarnanna. Tað hvílir tí ein álvarslig ábyrgd á einum landsstýri, sum ikki røkir og prioriterar hesa uppgávuna millum tær fremstu, sigur Jenis av Rana.